# Sethús í Trongisvági



Sethús í Trongisvági til sølu.

**Tlf. 372071 eftir kl. 18**
**ella tlf. 0045 24232278**

# Vikarur til Skála skúla

Søkt verður eftir vikari til 12 tímar um vikuna fyri lærara í barnsburðarfarloyvi. Starvið er frá 1. august til 31. desember 2002.

Tímatalvan: Føroyskt í 4. og 5. flokki, handverk og list í 3.-5. flokki.

Starvið er lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast frá skúlaleiðaranum, tlf. 442118 ella 211360.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 8. juli 2002.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
**v/ Rosu Prestá, 480 Skáli**

Stuðul til

# Sjúkufyribyrging innan havbúnað

Stuðulsskipanin »Sjúkufyribyrging innan havbúnað« er løgd til Vinnuframagrunnin at umsita.

Sambært hesi skipan kann studningur játtast til nýggjar granskingar-, royndar- og kanningarverkætlanir viðvíkjandi fyribyrging av sjúku hjá alifiski.

Upplýsingar um stuðulsskipanina, treytir o.a., og umsóknarblað fáast við at venda sær til Vinnuframagrunnin ella á heimasíðu grunsins.

**Vinnuframagrunnurin**
Hoyvíksvegur 51
Postboks 3079
110 Tórshavn
Telefon 312794
Telefax 316703
vfg@post.olivant.fo
www.vfg.fo



# Farmadeildin søkir SØLUFÓLK

Søkt verður eftir sølufólki til farmadeild okkara.

*Arbeiðsuppgávur:*
Uppsøkjandi søluarbeiði, herundir søla av tænastum innan farma-flutning og kundarøkt.

*Førleiki:*
Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni og helst hava royndir í søluarbeiði.
EDV-kunnleiki á brúkarastøði er ein treyt.

*Løn:*
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja tel. 345962/ 63 og spyrja eftir Jónfinni ella Heðini.

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2002.

team 85

**SMYRIL LINE CARGO**
**Postsmoga 370 • 110 Tórshavn**

# Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Frá 1. aug. 2002 er eitt tímalærarastarv (9 tímar/viku) leyst at søkja í lærugreinini

**latíni**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður sent til: **Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík, stílað til Mads A. Winther, rektara.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi sum skjótast í seinasta lagi hósdagin 20. juni 2002.

# Pedagogur ella hjálparfólk

**til Sambýlið í Pætursgøtu 3 í Hoyvík**

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum í Pætursgøtu 3 er eitt tænastumannastarv leyst at søkja til setan 1. juli 2002 ella eftir nærri avtalu. Um starvið ikki verður sett sum tænastumannastarv verður tað sáttmálasett á lønarstigunum 11-16.

Starvið verður sett eftir sáttmálum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt stigini 24, 25, 27, 28, 30 og 31 eftir lønartalvu pr. 01.03.02. Um eingin skikkaður pedagogur søkir verður starvið sett við fólki við øðrum førleika.

Í sambýlinum búgva 5 menn við diagnosuni Asberger syndrom. Til hetta brek verður brúktur ein skipaður arbeiðsháttur. Umsøkjarar, ið hava royndir við arbeiði av hesum slag, hava fyrimun. Ítróttur er ein partur av arbeiðinum. M.a. renning og svimjing og tí má umsøkjarin vera væl fyri kroppsliga.

Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum er at taka sær av íbúgvunum og øllum øðrum arbeiði í heiminum. Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur fakliga vitan og er áhugaður í at útbúgva seg meira. Hevur góð samstarvs- og innlivingarevni, er kroppsliga- og sálarliga væl fyri og ikki er bangin fyri at taka tøk.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv verða sett í pedagogstørvini, men um útbúgvið fólk ikki verður sett, verður starvið sett tíðaravmarkað við fólki við øðrum førleika.

Nærri fæst at vita um størvini frá Boga Andreasen, leiðara á telefon 215540. Umsóknarfreistin er 26. juni 2002 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlið í Pætursgøtu 3**
Att. Bogi Andreasen
Pætursgøta 3
FO188 Hoyvík

# Pedagogar

Søkt verður eftir 2 pedagogum, 30 t. um vikuna til eina stovu við 12 vøggustovubørnum frá 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 8 pedagogar, 4 hjálparfólk.

Endamál stovnsins er við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast bæði persónliga og saman við øðrum í tryggum og stimbrandi umhvørvi og í góðum samstarvi og samskifti millum foreldur og starvsfólk og starvsfólk sínámillum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 24. juni 2002.

**Kongshavnar Barnagarður og Vøggustova**
Heiðavegur · Postboks 119
FO-600 Saltangará



# Slaktari

Í Keypssamtøkuni í Hoyvík er eitt starv sum slaktarasveinur leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Lønin er sambært galdandi sáttmála fyri handverkarar.

Meira fæst at vita um starvið hjá slaktarameistaranum Lars Hansen, tlf. 314149.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**FK Hoyvík**
boks 349 · 110 Tórshavn

# Innskriving

**av børnum í nýggja frítíðarskúlan í Vági**

Sagt verður við hesum frá at innskriving av børnum í nýggja frítíðarskúlan kann fráboðast kommunuskrivstovuni skrivliga ella munnliga innan 15. juli.

**Vágs kommuna**
**Mentunarnevndin**

# Gott stevnubingo

verður í bygdarhúsinum í Hósvík mikudagin 19. juni kl. 19.00

Nógvir góðir vinningar m.a. á lutaseðli:

Ferð fyri tvey við bili í tveykoyggjukamari til Bergen við Norrønu



Øll eru vælkomin

**Hósvíkar Róðrarfelag & Bygdarfelagið Varðin**

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein**
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

# Handilslærlingur til Skemmuna



**Gerst lærlingur og fá nógvar fyrimunir!**

- **Møguleika fyri altjóða útbúgving**
- **Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla**
- **Møguleika fyri arbeiði í útlandinum við stórum avbjóðingum**

**Vit vænta av tær:**
At tú ert samstarvsfús/ur, ert sjálvstøðug/ur, hevur nógva orku og áræði, er opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Tú verður skjótt til nakað um tú sjálv/ur vilt:**
Tað er einki óvanligt, at ein nemingur í Skemmuni verður tilnevndur deildarleiðari stutt eftir lærlingatíðina, takkað verið teimum avbjóðingun hann fær. Tað eru nógv sum verða verandi í Skemmuni tá tey eru liðug at læra, og møguleikarnir eru nógvir. Í 16 ár hevur Skemman saman við deildum sínum í øðrum londum skapt meiri enn 300 arbeiðspláss. Og tað legst afturat ár um ár. Skemman hevur nú deildir í hesum londum: Íslandi, Canada, Letlandi og Litavia.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmørk.
Sjálvt skúlauppihaldið undir lærlingaútbúgvingini fer fram á "Jysk" skúla í Norður-Jútlandi. Útbúgvingin fer fram á stats viðurkendan hátt (øll almenn krøv verða fylgd), har tú,afturat teimum kravdu lærugreinunum, eisini fær nógv størri fakliga kunnan enn gjøgnum vanliga handilsútbúgving.
Gjøgnum skúla-uppihaldið býrt og etur tú á skúlanum saman við hinum lærlingunum. Hetta gevur eitt einastandandi samanhald til langt eftir lærlingatíðina.

**Krøv:**
At gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byrja?**
Lærlingaplássini skulu setast so skjótt sum møguligt.

**Ljóðar hetta spennandi?**
Send so eina skrivliga umsókn skjótast gjørligt til

team 85

**SKEMMAN**
Staravegur 7 100 Tórshavn Tel 315588
skemman@skemman.fo

Sosialurin

# Vegna summarfrí

er kommunuskrivstovan stongd frá 24. juni til og við 5. juli 2002.

**Hósvíkar kommuna**